# Møðsamt at byrja av nýggjum hvørja ferð

*Dóttir Jórun fyllir 13 ár í næsta mánaða. Hon er menningartarnað og hevur tørv á serligum stuðuli. Higartil hevur hon havt ikki færri enn 15 stuðulsfólk, tí tær støðast so illa í arbeiðnum*

ÁKI BERTHOLDSEN

At hava 15 stuðulsfólk í 13 ár.

Tað bleiv luturin hjá havnargentuni, Elsu Mariu og foreldrum hennara.

Elsa Maria er menningartarnað og hevur tí alla tíðina havt serligt stuðulsfólk at hjálpa sær og húskinum ein part av degnum.

Á økisfundinum hjá Javna mánakvøldið, greiddi mamma hennara, Jórun Dánjalsdóttir Poulsen frá, hvussu hon helt, at hendan skipanin virkaði hjá teimum, sum høvdu brúk fyri henni.



*– Tað er ikki nokk at vera fittir. Tað krevst eisini stórur dugnaskapur, ikki minst til at seta seg inn í viðurskiftini hjá teimum menningartarnaðu, segði Jórun Dánjalsdóttir Poulsen*

Og hon helt, at hetta var ein skipan, sum vit bæði kundu siga nógv gott og nógv minni gott um.

Jórun segði, at skuldi mann taka tað góða fyrst, helt hon at tímatalið, sum stuðulin varð játtaður, var nøktandi. Umframt stuðulin, hevði hon eina fasta umlætting uppa tvey samdøgur um mánaðin í frítíðarheiminum í Skrivaragøtu, og tað vóru tey sera fegin um.

Tó vísti hon á, at høvdu tey ikki havt tilhaldið í KFUM, so helt hon, at hon var flutt av landinum.

Men tað er ikki nøktandi, tí tað er ov stórt glopp ímillum børnini. Elsa Maria er skjótt 13 ára gomul, ein onnur genta er 15 ár, men annars er talan um 6-8 ára gomul í KFUM

Tørvin at vera saman við sínum javnaldrum fær hon tó so dánt nøktaðan í skúlanum

Jórun Dánjalsdóttir Poulsen helt, at eitt tað største brekið við skipanini, var, at stuðlarnir støðast so illa í arbeiðnum Hesi 13 árini dóttir hennara hevur havt stuðul, hevur hon havt ikki færri enn 15 stuðulsfólk.

Stuðlarnir, sum hildu longst á, hildu í tvey ár, og tað vóru tveir.

Hini níggju árini hevur hon sostatt havt 13 stuðlar, so summir hava steðgað stutt.

Jórun segði, at hvørja ferð ein stuðul fór, og ein nýggjur skuldi byrja, nýggjur skuldi byrjað, var neyðugt at byrjað av nýggjum og hon helt, at tað var sera møðsamt at skula byrja heilt av botninum umaftur og umaftur.

Í skúlanum eru so fýra stuðlar afturat, so alt í alt, er nógv fólk uppi í leikinum.

Hon segði, at fyri langari tíð síðani høvdu tey fingið at vita, at tey vóru undir eini skipan hjá Tórshavnar Kommunu.

Men so fingu tey aftur at vita, at vita, at tey kundu ikki vera í skipanini longur, tí hon var ovbyrjað.

Men tað harmiliga var ,at tey børnini, sum tá vóru koyrd úr skipanini, vóru tey menningartarnaðu meðan tey, við sosialum trupulleikum vórðu verandi. Uppaftur seinni fingu tey so aftur at vita, at tey vóru komin aftur í skipanina hjá Tórshavnar Kommunu.

Hon segði hetta bara fyri at vísa, hvussu skiftandi umstøðurnar hjá teimum vóru.

Jórun hevði alt gott at bera stuðlinum, tí teir vildu alt tað besta, tó tað var eitt sindur misjavnt, hvussu teir settu seg inn í arbeiði.

Hon helt, at í mongum førum brúktu stuðlarnir hetta høvi bara sum eina lopfjøl til eina aðra útbúgving.

### Ikki nóg gott

Hon helt, at orsøkin til alt hetta var, at stuðulsskipanin er ikki nóg góð og at arbeiðsviðurskiftini hjá stuðlunum eru ikki nóg góð.

Tað, hon droymdi um, var at arbeiðið sum stuðul varð raðfest hægri og at tað varð gjørt meiri lokkandi at verða stuðul, tí tað tað var sanniliga ein stór ábyrgd.

– Eitt nú helt hon, at stuðarnir høvdu okkurt fast tilhaldsstað, tí tað var alt ov krevjandi fyri allar partat at vera inni hjá fólki alla tíðina

Somuleðis krevst stórur dugnaskapur, ikki minst til at seta seg inn í støðuna hjá teimum menningartarnaðu, tí tað er ikki nóg mikið bara at vera fittir.

# Nú má tað gerast sum skal gerast

*– Málið um meirnýtsluna hjá Sjónvarpinum er púra greitt, sigur Edmund Joensen, formaður í Landsstýrismálanevndini*

ÁKI BERTHOLDSEN

–Hetta er so greitt sum tað kann vera. Og nú má tað gerast, sum gerast skal.

Tað heldur Edmund Joensen, formaður í Landsstýrismálanevndini hjá løgtinginum um meirnýtsluna hjá Sjónvarpi Føroya.

Ein partur av uppgávuni hjá Landstýrismálanevndini er at hava eftirlit við embætisførsluni hjá landsstýrismonnunum.

Og júst hetta var ein orsøk til, at nevndin av sínum eintingum tók málið um meirnýtsluna hjá sjónvarpinum.

Og tað gekk eisini skjótt hjá nevndini at avgreiða málið.

–Hetta er so einfalt, sigur Edmund Joensen

– Landsstýrismálanevndin hevur eina starvsskipan sum sigur, hvussu ymisk mál skulu vigerast.

Og í henni stendur, at er talan um eitt mál, har peningur er brúktur, uttan at vera játtaður, skal tað sendast beinleiðis til landsgrannskoðaran.

Edmund Joensen sigur, at í hesum liggur, at slík mál eru so greið og so uppløgd, at tað er óneyðugt hjá nevndini at brúka tíð og orku uppá at viðgera tey meiri.

Hann sigur, at tað er hetta, sum Landsstýrismálanevndin hevur gjørt í hesum føri, tí hetta var eitt av teimum heilt greiðu málunum, sum vóru skjót at avgreiða.

### Gera tað, sum gerast skal

Formaðurin sigur, at her er talan um at brúka pening, uttan at hann er játtaður frammaundan og tað er heilt einfalt talan um brot á stýrisskipanarlógina.



*– Málið um meirnýtsluna hjá sjónvarpi um var skjótt at avgreiða, sigur formaðurin í Landsstýrismálanevndini*

– Slíkt átti ongatíð at komið fyri. Men hendir tað kortini, er talan um eitt álvarsmál, og so má tað fáa tær avleiðingar, sum eitt slíkt mál eigur at fáa.

Og tað eru bara tveir møguleikar: Antin ger løgmaður tað, sum hann skal gera, ella má løgingið gera tað.

Men Edmund Joensen sigur, at hann vil ikki útgreina, hvat liggur í tí.

– Landsstýrismálanevndin hevur avgreitt málið og eg fari at halda meg til mín leiklut og fari at lata Løgmann og Løgtingið um at greiða sín leiklut.

Men hann vísir á, at tað er ábyrgdin hjá løgmanni at hava eftirlit við, at landsstýrismenn umsita lógina- ikki bara á lógligan hátt, men eisini á fullgóðan hátt.

–Fíggjarlógin er ein lóg, og tað er ólógligt at brúka pening, sum ikki er játtaður.

– Men harumframt eigur ein landstýrismaður at umsita sítt málsøki uppá ein slíkan máta, at hann heldur umsitingarliga siðvenju.

Sostatt skal hann bera seg at á ein hátt, sum ikki uppá nakran máta kann elvi fólki til at sáa iva um hansara embætisførslu, sigur Edmund Joensen.

## Havnarkórið til Fuglafjarðar

Sunnukvøldið fer Havnarkórið at halda konsert í Fuglafjarðar Kirkju.

Á skránni eru mest kórsatsir, sum Vagn Holmboe skrivaði til yrkingar eftir Janus Djurhuus, Chr. Matras og W. Heinesen, sum T. N.Djurhuus hevur latið í føroyskan málbúna. Men kórið fer eisini at syngja gomul føroysk sálmaløg, sum Karl Clausen, Kári Bech og Heri Eysturlíð hava gjørt satsir til.

Kórsatsirnir hjá Vagn Holmboe hava verið afturvendandi á skránni hjá Havnarkórinum seinastu 25 árini.

Og nú ein stór tónleikastevna skal haldast í Horsens, heimbýi hansara, nú hann hevði fylt 90, er tað fallið kórinum í lut at enda stevnuna við konsert í Klosterkirken sunnukvøldið 2. apríl.

Samstundis fer Havnarkórið eisini til Odder at verða við í føroyskum mentanartiltakið har, har tað skal syngja fleiri staðni.

*– Áki–*



# Bókaútsølan byrjar mánadagin

*Mánadagin byrjar bókaútsølan. Hon er 3. hvørt ár og hetta er 4. útsølan. Við eru 17 forløg og 360 bókaheiti*

DAGFINN OLSEN

Fyrsta bókaútsølan var í 1989. Bókaútsølan er 3. hvørt ár og mánadagin byrjar 4. útsølan, har ein kann ogna sær góðar bøkur fyri bíligan penga.

Bøkurnar, ið eru á útsølu, eru ikki yngri enn 3 ár og tær sleppa bert at vera við á útsøluni tvær ferðir.

Fyrireikararnir siga, at teir við hesum á ein hátt gera upp. Útsølan fær vanliga góða undirtøku og á útsøluni eru nærum øll føroysk listafólk umboðað. Nógv skrivandi fólk og eisini myndlistafólk, ið hava myndprýtt bøkur.

Tað er Bókhandlarafelagið og Føroysk Bókaforløg, ið skipa fyri. Har fegnast tey um, at tað enn eru fólk í Føroyum, ið ikki kunnu halda seg frá at skriva og yrkja á føroyskum. Eisini fegnast tey um, at bæði professionell og glaðir amatørar vilja geva út og at hetta kann gerast við eitt sindur um stuðuli.

Í USA skal ein bók selja yvir 5000 eintøk, fyri ikki at fáa stemplið „fiasko“ á seg. Í Danmark fara bøkur ikki ofta uppum 5000 seld eintøk.

Í Føroyum verður ein miðal bók seld í eini 300 - 500 eintøkum. Men eins og aðrastaðni, so eru tað bøkur ímillum, ið selja meira enn aðrar. Í Føroyum eru tað serliga søguligar bøkur. Í Føroyum eru tað bøkur við myndum og myndteksti, har ein kanska kennir fólk aftur, ið ganga sum heitt breyð.

Nógvar av bókunum á bókaútsøluni komu út í kreppuárunum.

Hóast kreppuna, so komu bøkur út. Í Føroyum koma einar 150 bøkur út árliga. Harav geva kanska 10 fíggjarligt yvirskot.

Tað eru serliga jólini, ið hava týdning fyri bókasølurnar. Tá hava bókhandlarnir rættiliga jóladagar.

Tað er eisini undan jólum, at bøkur koma út. Hetta er galdandi fyri bæði føroyskar og útlendskar bøkur.

Bókaútsølan byrjar mánadagin 27. mars og heldur fram til leygardagin 6. mai.

Í samband við útsøluna kemur blað í hvørt hús við yvirliti yvir bøkurnar, ið eru á útsølu. Har kann ein eisini bíleggja bøkur frá bókhandlunum.



*Kári Árting úr Bókhandlarafelagnum sigur, at gjørligt verður at ogna sær bøkur fyri helvtarprís, ella minni á bókaútsøluni*
**Mynd: Jens Kristian Vang**

# Eykakonsert leygardagin

*Fríggjadagin verður symfoniin Oceanic Days framførd í Norðurlandahúsinum og longu nú er nærum útselt til konsertina*

DAGFINN OLSEN

Fríggjadagin 31. mars verður fyrsta føroyska symfoniin framførd. Sunleif Rasmussen hevur skrivað verkið, ið kallast Oceanic Days.

Tað er íslendska symfoniorkestrið - Sinfóníuhljómsveit Íslands - ið framførir. Eisini eru onnur verk á skránni. Bernharður Wilkinson stjórnar.

Stórur áhugi er og longu nú er nærum útselt til konsertina.

Tí skipar Norðurlandahúsið fyri eyka konsert leygardagin klokkan 16. So hava tey møguleika at ogna sær atgongumerki, sum ikki vóru so heppin at sleppa til fyrstu konsertina.







GSM frá Føroya Tele

...so ert tú altíð har, tú skalt vera!

Vel tað GSM-haldið, ið hóskar best til tín...

Vanligt hald
1,40 kr./min. um kvøldið • Mánaðargjald: 115,00 kr.

Vinnuhald
1,60 kr./min. alt samdøgrið • Mánaðargjald: 200,00 kr.

Frítíðarhald
0,90 kr./min. um kvøldið • Mánaðargjald: 75,00 kr.

Vinnuhaldið
Til teirra, sum serliga brúka telefonina um dagin, og sum altíð vilja hava samband við viðskiftafólk og starvsfelagar. Eisini er hópurin av eykatænastum knýttur til haldið, t.d. SMS-tekstboð, vís nummar og dataflutningur.

| Kostnaður fyri vinnuhald | |
|---|---|
| Stovning | 700,00 kr. |
| Mánaðargjald | 200,00 kr. |
| Minuttgjald - dag | 1,60 kr. |
| Minuttgjald - kvøld | 1,60 kr. |
| Uppringingargjald | 0,40 kr. |

FØROYA TELE
Tel 30 30 30 • Fax 30 30 31 • www.tele.fo